

Lagt til rættis: Eydna Skaale

# FRÓÐSKAPARS

**Einasta universitetið í heiminum, sum tekur útgangsstøði í føroyskum viðurskiftum. Umsóknarfreist 1. juni 2011. www.setur.fo**









**Sjúkrarøktafrøðiskúli Føroya:**

## Sjúkrarøktarfrøði

Undirvísingin á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya er skipað í 16 modul, sum taka 4 ár tilsaman, og sum eru ein blandingur av bókligari og praktiskari læru. Umframt frálæru í sjúkrarøkt, anatomi og mikrobiologi, snýr undirvísingin seg eisini um t.d. námsfrøði, heimsspeki, samfelagsfrøði, samskifti og sálarfrøði.

Til ber at lesa bachelor í sjúkrarøkt við 2,5 árum í skúla og 1,5 ár í starvslæru, altso 4 ár tilsamans. Til ber ikki at lesa master í Føroyum, men master kann takast uttanlands, eftir at bachelorútbúgvingin er tikin í Føroyum.

22 lesandi verða tikin inn árliga.

Upptøkukrav er miðnámsprógv ella samsvarandi útbúgving/ royndir.

**Føroyamálsdeildin:**

## Føroyskt

Á føroyamálsdeildini eru nógvar ymsar lærugreinar innan evnið "føroyskt". Ævintýr, yrkingar, týðingarfrøði, máltøka, barnamál, postkolionalisma í bókmentum, purisma o.m.a.

Lærugreinarnar tvey tey fyrstu árini eru fastlagdar, men á BA-árinum og á masterlestrinum velur tú millum ymsar greinar. Valfríu lærugreinarnar eru skiftandi.

Til ber at lesa bæði bachelor og master í føroyskum. Lesturin er skipaður við tveimum árum av støðisnámi og einum bachelorári, og um tú ynskir at fara víðari, eru tvey ár av masterlestri.

Upptøkutreyt er miðnámsprógv.

Lesandi verða tikin inn 2. hvørt ár, næstu ferð í 2012.

**Náttúruvísindadeildin:**

## Jarð- og havfrøði

Undirvísingin í Jarð- og havfrøði er skipað í tríggjar høvuðspartar: jørð, hav/ veðurlag og umhvørvi. Jarðvísindaligi parturin snýr seg m.a. um jørðina og menning hennara, undirgrundina og ráevni. Havvísindaligi parturin snýr seg m.a. um streym, sjóvarfall og hvønn týdning havið hevur fyri veðurlagsbroytingar.

Til ber at lesa bachelor í lívfrøði á Setrinum, og master kann takast uttanlands.

Upptøkukrav: miðnámsprógv við støddfrøði á A-stigi, alisfrøði á A-stigi og evnafrøði á C-stigi. Aðrir upptøkumøguleikar eru eisini undir "upptøkutreytir" á www.setur.fo

Lestrarbyrjan august 2012

**Náttúruvísindadeildin:**

## Lívfrøði

Undirvísingin í lívfrøði er skipað í modul, við tveimum modulum á hvørji lestrarhálvu.

Ymsu modulini snúgva seg t.d. um lívsins uppruna, um hvussu lívið broytist, hvussu livandi verur eru uppbygdar, og hvussu tær mennast.

Útbúgvingin tekur støði í djóra- og plantuheiminum á sjógvi og landi.

Til ber at lesa bachelor í lívfrøði á Setrinum, og master kann takast uttanlands.

15-20 lesandi verða tikin inn árliga.

Upptøkukrav: miðnámsprógv við støddstøði á B-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði antin á B-stigi ella á C-stigi + A-stig í støddfrøði

Lestrarbyrjan er august 2012

**Náttúruvísindadeildin:**

## KT- verkfrøði

KT-verkfrøði snýr seg um at menna tekniskar, fyrisitingarligar og handilsligar telduskipanir, og KT- verkfrøðingar arbeiða t.d. innan dátuviðgerð, forritan og menningarleiðslu.

Undirvísingin er býtt upp í modul, sum vara eina lestrarhálvu hvørt, og tilsamans er lestrartíðin 3 ár. Til ber at lesa bachelor í KT-verkfrøði í Føroyum, og master kann lesast uttanlands.

15-20 lesandi verða upptikin árliga.

Upptøkukrav: Miðnámssprógv við B-stigi í støddfrøi

Lestrarbyrjan august 2012



## Cambridge Certificate skeið í enskum

Til ber at taka trý ymisk skeið í enskum á Fróðskaparsetrinum. "First Certificate" er á lægsta torleikastigi, síðani kemur "Advanced English" og at enda "Proficiency in English". Proficiency in English er upptøkukrav á flestu ensktmæltu universitetunum.

Undirvísingin er frá oktober til juni. Kostnaður er 3000 kr + próvtøkugjald. Skeiðsbyrjan 19.-20. oktober 2011.





## Journalistisk eftirútbúgving

Journalistiska eftirútbúgvingin verður bjóðað umvegis Danmarks Medie- og Journalisthøjskole. Hon er ætlað føroyingum, sum arbeiða í miðlunum ella við samskifti. Undirvísingin, sum fer fram á Fróðskaparsetrinum og á netinum, er á donskum, men útgangsstøðið er í føroyskum viðurskiftum. Innihaldið í pørtunum er frá journalistútbúgvingini í Danmark, og undirvísingin er á sama stigi sum journalistiska grundútbúgvingin. Nakrir partar verða bodnir í senn, sum kunnu setast saman til eina heila diplomútbúgving.

Upptøkukrav:
Minst studentaskúlaprógv.
Hevur tú frammanundan tvey ára starvsroyndir og stutta framhaldsútbúgving, kann tað stytta um skeiðið.

les meiri á: http://www.update.dk/foroya